# Eivør hevur útgávukonsert á G!



*Eivør er í toppformi, tað kundi eitt nú upplivast á AME-Føroyar í Norðurlandahúsinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eivør verður aftur í ár á G!, hesaferð verið heimskendum írskum tónleikarum aftan fyri seg.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í summar kemur nýggja fløgan hjá Eivør út, og í dag avdúkar G! Festivalurin, at Eivør aftur í ár er festivalskráni í Syðrugøtu. Talan verður sostatt um útgávukonsert á Gøtusandi, og til hesa konsertina hevur Eivør manningina, ið hon brúkar á fløguni, ið er telur nakrar av bestu írsku elitutónleikarunum.

### Nýggjur tónleikur

Nýggja fløgan hjá Eivør Mannabarn, verður givini út í eini føroyskari útgávu og í eini enskari undir heitinum Human Child. Nøkur løg hava longu verið framførd í Føroyum fleiri ferðir, t.d. Grát ei, sum vann sangskrivarakappingina hjá Atlantic Music Event, og Norðurlandahúsinum og ”Elinborg og Elisabeth Maria, sum hevur verið fastur partur av spæliskránni hjá Eivør seinastu árini. Og sum eisini hevur verið eitt útvarpshitt í live-útgávu. Eisini løg sum Móðir Teresa og Livandi Trø, hava brent seg fast í minnið hjá teimum, sum hava verið á seinastu konsertunum hjá Eivør. Tilsamans eru 10 løg á fløguni. Harav hevur Eivør skrivað tey níggju sjálv.

### Irish Cream

Tað kann roknast við eini uppliving av teimum stóru á Gøtusandi. Eivør er so væl fyri og osar av yvriskoti og spæligleði sum ongantíð áður, hetta kundi t.d. upplivast á AME konsertunum í Reykjavík og í Havn. Ummælarar hava kappast um at senda Eivør lovorð. Tað er eisini greitt, at bólkurin á hesi konsertini er frálíkur. Hon hevur nakrar av absoluttu topptónleikarunum í Írlandi, kremið innan írskan tónleik. Harímillum framleiðaran á nýggju fløguni Donald Lunny, sum verður mettur sum ein av mest týðandi persónunum handan menningina av írskum tónleiki og sum hevur framleitt fyri m.o. Sinéad O'Connor, Rod Stewart, Paul Brady, Elvis Costello, Indigo Girls og Baaba Maal.

Millum manningina we eisini Anthony Drennan á gittara, sum m.a. hevur verið spælt gittari og bass við Genesis á konsertunm umframt at hava spælt við The Corrs, Clannad og Paul Brady.

Liam Bradley spælir trummur, hann er kendur sum trummarin hjá m.ø. Ronan Keating, Van Morrison og Sinead O'connor. Noel Eccles spælir ásláttur og hann hevur spælt við mætum nøvnum sum U2, Van Morrison, Sting, The Chieftains, Hothouse Flowers, Elvis Costello og Sinead O'Connor.

Eivør hevur nærum verið fast navn á G! Skránni, síðan hon á fyrsta G! spældi við Clickhaze, bert tað eina árið bar ikki til hjá Eivør at luttaka á stóra tiltakinum í heimbygdini.

# Samanbar Gøtu við Liverpool

**Sendingin Studio 4 á donsku útvarpsrásini P4 varpaði í gjár ljós á Atlantic Music Event, og á blómandi tónleikalívið í Føroyum eitt nú í Gøtu.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Danski plátufelagsstjórin Jens Ove Friis metur føroyska tónleikapallin vera sera spennandi í løtuni*
*Mynd: Niels Uni Dam*

Hvussu kann tað bera til, at fólk úr tónleikaídnaðinum frá nær og fjar, fara longu leiðina til 18. fjarskotnar og vindbardar oyggjar fyri at brúka eitt vikuskiftið har? Hetta var spurningurin, sum í gjár var settur í sendingini Studio 4 á Danmarks Radio P4 í tímanum millum 14-15. Gestirí sendihølinum var Jens Ove Friis, plátufelagsstjóri á felagnum Reccart. JOF, sum hann vanliga verður róptur, svaraði spurninginum í sendingini, og lýsingarorðini vóru sera jalig. Plátufealgsstjórin, sum avdúkaði fyri planet.fo herfyri, at hann fór at skriva sáttmála við tvey av nøvnunum á AME-Føroyar var komin á gátt, við nýggjum tónleiki við Boys In A Band og Eivør.

Hann greiddi frá, at áhugin millum fólk í ídnaðinum var vaksin nógv, tí fólk sóu Teit, og vildu fegin uppliva tónleikapallin, ið hevur fostrað hann.

JOF greiddi frá, at hann var áhugaður í at gera sáttmála við Boys In A Band. Men, at hann metti, at eini 5-7 nøvn, av teimum, ið hann hevði hoyrt í Føroyum, saktans kundu gera seg galdandi á altjóða tónleikapallinum. Hann greiddi livandi frá, hvussu upplivingin av Boys In A Band í Kagganum hevði sannført allar útlendsku gestirnar. Upplivingin av bólkinum á konsert var heilt vill, segði hann og vísti á, hvussu sangarin Pætur við íblástri frá Bob Dillan skrivaði tónleik, tí hann mátti, og samanbar hann við danska tónleikahalgimenni Eik Skaløe úr Steppeulvene.

Eisini framførslan hjá Eivør fekk jalig orð við frá plátufelagsstjóranum. Hann segði, at framførslan enn sat á rygggeislunum á honum, og tá hann hugsaði um hana, fekk hann enn gásarhold. Hann kallaði Eivør magiska og fantastiska. Eisini bólkin hjá Eivør rópti hann fantastiskan. Hann var als ikki í iva um, at Eivør um 3-5 ár var eitt heimsnavn.

Jens Ove Friis vísti á, at hann í nógv ár hevði fylgt við á føroyska tónleikapallinum, og kallaði føroyska tónleikapallin ein tónleikaligan smeltipott. Hann samanbar tónleikaumhvørvið í Gøtu við Århus í 80'unum og Liverpool í 60'unum.

Hann vísti á, at hann helt føroyska tónleikin vera sera áhugaverdan, tí hann hevði eina rástyrki og orku, ið kom úr føroysku søguni.